# Nýggi Smyril skal einskiljast

**– Fyri at fáa so góða nyttu sum gjørligt burturúr nýggja Smyrli, eigur hann at verða tikin burturúr Strandferðsluni, heldur samferðslubólkurin í Suðuroy**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað einasta rætta er at einskilja nýggja Smyril og at leggja hann í eitt alment partafelag í Suðuroy, sigur Jacob Vestergaard, talsmaður fyri samferðslubólkin í Suðuroy*

Nýggi Smyril eigur at verða einskildur.

Tað heldur samferðslubólkurin í Suðuroynni.

Á evnisdegnum í Øravík leygardagin um samferðsluviðurskiftini í Suðuroy, segði Jacob Vestergaard, at samferðslubólkurin í Suðuroy, er komin til ta niðurstøðu, at besti mátin at gagnnýta nýggja Smyril uppá, er at taka hann burturúr Strandferðsluni og at einskilja hann.

Jacob Vestergaard, sum er talsmaður hjá samferðslubólkinum, helt, at nýggi Smyril sera nógvar møguleikar í sær.

– Sum leikmaður, dugi eg sjálvtsagt ikki at síggja allar teir møguleikarnar nýggi Smyril gevur okkum. Men hjá professionellum fólki, eigur tað at verða sera áhugaverd uppgáva og avbjóðing at fara í gongd við helt hann.

## P/F Suðurleiðin

Spurningurin er so, hvussu vit best útnytta hesar møguleikarnar?

– Samferðslubólkurin hevur viðgjørt hetta og er komin til tað niðurstøðu, at uppgávan hjá nýggja Smyrli best verður røkt í einum partafelag, P/F Suðuroyarleiðini, segði hann.

Í hesum sambandi nevndi hann møguleikar at leggja nýggja Smyril í eitt alment partafelag.

– Er politiskur vilji til at leggja nýggja Smyril í eitt alment partafelag, hevði tað verið besta amboðið til at gagnnýtt tað stóra aktiv, sum nýggi Smyril er fyri Suðuroynna.

Hann vísti á, at Strandferðslan hevur til uppgávu at røkja flutning av ferðafólki og farmi ímillum Suðuroynna og Havnina skjótt og væl. Og har er hon dugnalig.

– Men onnur øki, liggja uttanfyri teirra arbeiðsøki. Og í hesum sambandi hevði P/F Suðuroyarleiðin, við heimstaði í Suðuroynni, alla tíðina vitað hvat rørdi seg í Suðuroynni og hvønn tørv suðuroyingar hava. Og eftir tí kundi felagið rikið nýggja Smyril.

Hann segði, at hetta er gongdin í londunum rundanum okum. Og hann helt eisini, at tær royndir, vit høvdu av hesum í Føroyum, hava verið góðar.

Hetta er eitt hugskot, sum samferðslubólkurin tekur í fullum álvara og sum hann fer at fyrireika seg so væl sum gjørligt til at fáa undirtøku fyri.

Bólkurin hevur nevnilig sett fakfólk til at arbeiða við ætlanunum um at leggja Smyril í eitt alment partafelag og koma við ymiskum uppskotum um, hvussu tað kann gerast.

Samstundis var hann greiður yvir, at alt hetta varð sjálvtsagt treytað av, at politiski mynduleikin tekur undir ætlanini.

– Men við at fyrireika ætlanina væl, vóna vit at politiski mynduleikin vísur okkum vælvild.

Talsmaðurin hjá samferðslubólkinum í Suðuroy segði, at enn var ov tíðliga at siga nakað um, hvussu P/F Suðuroyarleiðin kundi skipast sum best.

Men hann helt, at tað var ein fortreyt fyri at fáa eina skipan, sum er nóg smidlig til at uppgávan kann verða røkt til fulnar.

## Liggja nærmast

Í hesum sambandi vísti Jacob Vestergaard eisini á, at á samferðsluøkinum henda sera nógvar broytingar.

– Tað er ikki tí ikki óhugsandi, at framtíðarflutningur millum Føroyar og meginlandið í Evropa, verður úr Suðuroy. Vit liggja næst og tíð er pening. So skulu vit gera okkum vónir um at kappast á marknaðinum í Evropa, eitt nú við feskum fiskavørum, mugu vit hava so gott samband við meginlandið sum gjørligt.

– Umstøður eru í dag í Suðuroynni hjá stórum skipum sum Nørrønu at leggja at, bæði á Tvøroyri og í Vági, og við nýggja Smyrli eru ongir trupulleikar at føra allar tær neyðugu útflutningsvørurnar skjótt og gott til Suðuroynna, segði Jacob Vestergaard.

# Sløkkiliðið flutt fram í nútíðina

**Mánakvøldið komu tveir nýggir sløkkiliðsbilar til Suðuroynna**

SLØKKILIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú eru sløkkiliðini í Suðuroy flutt fram í nútíðina.

Mánakvøldið komu tveir spildurnýggir sløkkiliðisbilar til Suðuroynna, har teir skulu loysa teir elligomlu og ótíðarhóskandi bilarnar av.

Hetta er eitt sera stórt framstig fyri brunatrygdina í Suðuroy, tí teir bilarnir, sum eru, eru gamlir og als ikki tíðarhóskandi longur. Hesir báðir bilarnir eru av merkinum Scania, men teir eru bygdir í Danmark.

Annan bilin hava kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy, Sumba, Vágur, Porkeri og Hov, keypt saman og hann kemur at standa í bjargingarstøðini í Vági

Hin bilin hava Tvøroyrar Kommuna og Hvalbiar Kommuna keypt saman og hann kemur at standa á brandstøðini á Tvøroyri.

Fámjins Kommuna er ikki við í tiltakinum, ikki enn í hvussu so er, so enn er óvist, hvussu verður, kemur eldur í í Fámjin. Men fyribils verður tað so helst til, at teir verða noyddir at leiga bilin, skuldi brúk verið fyri honum í Fámjin. Bilarnir kosta ímillum hálvaaðru og tvær milliónir hvør.




*Suðuroyingar hava fingið spildurnýggjar brandbilar og tað er eitt stórt framstig*
*Mynd Leivur Nygaard*



# Ferðin hjá lítla Peturi útsett

**– Seinast, vit hoyrdu nakað frá landsstýrismanninum tóktist hann sinnaður at leggja nógv fyri, at eitt tilboð verður veitt Peturi, so hesin framhaldandi kann búgva í Føroyum, greiðir Bára Johansen frá**

LÍTLI PETUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Bára Johansen, forkvinna í MBD/Damp felagnum, sigur, at fleiri familjur hava bjóðað seg til at taka sær av Peturi, so fimm ára gamli drongurin fær møguleikan at veksa upp í Føroyum*

Eftir ætlan skuldi nógv umrøddi lítli Petur verið sendur á danskan viðgerðarstovn 7.juni. Omma og abbi Petur fingu útsett avgerðina til mánadagin 14. juni, men í dag, 16 juni, er 5 ára gamli Petur framvegis at finna í Føroyum.

Bára Johansen er forkvinna í MBD/Damp felagnum, og hon greiðir frá, at avvarðandi myndugleikar hava gjørt av at útseta avgerðina enn einaferð.

– Tað einasta, eg veit er, at flogbillettin hjá honum til Danmarkar er útsett. Landsstýrismaðurin, Tórshavnar býráð og Karup kommuna royna nú at finna eina endaliga loysn í málinum, sigur forkvinnan í MBD/Damp felagnum.

Hon hevur góðar vónir um, at 5 ára gamli Petur sleppur at halda fram við at búgva í Føroyum.

– Seinast, vit hoyrdu nakað til landsstýrismannin tóktist hann sinnaður at leggja nógv fyri, at eitt tilboð verður veitt Peturi, so hesin framhaldandi kann búgva í Føroyum, greiðir Bára Johansen frá.

## Familjur bjóða seg til

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur áður sagt, at tað fer at taka nøkur ár, áðrenn eitt stovnstilboð verður veitt smábørnum við atferðartrupulleikan. Hann nevndi tí møguleikan fyri at útbyggja núverandi fosturforeldraskipanina, áðrenn ein stovnur verður klárur til atferðartruplu børnini í Føroyum.

Tað er framvegis ikki greitt, hvør endaligi úrskurðurin verður í málinum um lítla Petur. Sambært forkvinnuni í MBD/Damp felagnum hava fleiri familjur bjóðað seg til at taka sær av Peturi, so fimm ára gamli drongurin fær møguleikan at veksa upp í Føroyum.

# 30 bólkar vilja spæla á Ólavsøku

Tað er gravgangur at sleppa at spæla á Ólavsøkukonsertini í ár

FUT er farið undir drúgvu fyrireikingarnar til Ólavsøkukonsertina, 27. juli í ár. Fyrireikingarnar ganga væl, og innan ikki alt ov langa tíð, er tað mesta komið í rættlag í samband við konsertina

Tað er framvegis ikki greitt, hvørjir bólkar verða á síggja á pallinum í Kommunuskúlagarðinum dagin fyri Ólavsøku í ár.

Formaðurin í FUT, Kaj Johannesen sigur, at fleiri enn 30 bólkar liggja framvið at sleppa at spæla á Ólavsøkukonsertini, men endaligu nøvnini verða ikki almannakunngjørt fyrr enn fyrst í juli mánað.

**-páll**

# Blóðdonorfelagið úti um seg



*Starvsfólkini í Statoilstøðini í Klaksvík høvdu skift vanliga búnan út við t-troyggjurnar frá blóðdonorliðinum*

Mánadagin vóru fólk frá Klaksvíkar Blóðdonorliði úti við ballónum, t-troyggjum og keppum, har Latið blóð stendur á. Hetta átakið verður gjørt sum eina roynd at fáa fleiri fólk at lata blóð.

– Vit standa ikki og mangla donorar akutt, men tað er altíð gott at fáa fleiri, og er hetta samstundis ein roynd at gera vart við, at blóðdonorliðið er til , verður sagt frá Klaksvíkar blóðdonorliði.

Tey hava verið á fleiri støðum, har nógv fólk koma, og meta tey, at tað er ein góður máti at koma í samband við møguligar donorar.

Til dømis høvdu tey verið í Statoil støðini í Klaksvík, har starvsfólkið gekk í hesum t-troyggjunum og keppunum. Ballónirnar hingu so uppi yvir kassanum, og á diskinum lá ein listi, har fólk kundu tekna seg sum donor. Og fleiri høvdu nýtt høvi til tað mánakvøldið, sást á listanum.



**Fyri ein av okkara kundum, sum er eitt framleiðsluvirki, søkja vit eftir stjóra**

**Tað verður roknað við at tú, umframt at hava góð samstarvsevnir, hevur:**
- royndir innan søluarbeiði
- royndir innan leiðslu og planlegging
- teldukunnleika á brúkarastøði
- íbirtingarhug og - evnir

Tað er neyðugt at tú hevur koyrikort til bil.

Løn eftir avtalu.

Er hettar nakað fyri teg, so halt teg ikki aftur, men send okkum eina skrivliga umsókn, saman við evt. viðmælum, innan fríggjadagin tann 18. juni 2004, til:

**Sp/f Grannskoðaravirkið**
**Hermund Jacobsen**
**skrásettur grannskoðari**
**boks 16 - 110 Tórshavn**
**teldupostur: hermund@hermund.fo**

SP/F GRANNSKOÐARAVIRKIÐ
HERMUND JACOBSEN
SKRÁSETTIR GRANNSKOÐARAR